www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum

ENDURLÝSING

# Redaktiónsleiðari

## -Vilt tú vera við til at mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum sóknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum saman við blaðstjóranum skal leggja til rættis framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit sóknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu innan 16. oktober senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo.*
*Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*

**TILTØK**

Bíbliutími, Matt. 19,27 - 20,16.
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hósdagin kl. 16.00 - 16.45 Gentukórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v. Mourits Mouritsen, Meinigheitskórið syngur..
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 19 byrjar familjulegan í Nesvík.
Sunnudagin: Eingi møti og eingin sunnudagsskúla vegna familjuleguna.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
*www.gospel.fo*

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 06.00 kl. 06.00 morgunbøn.
Mikudagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 tímabøn, kl. 19.00 Delli
Hósdagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 19.00 Chill
Fríggjadagin kl. 06.00 morgunbøn.
Leygardagin kl. 21.00 Flare
Sunnudagin kl. 10.45 morgungudstænasta - Ólavur Jacobsen talar, kl. 11.30 Barnagudstænasta.
Øll eru hjartaliga vælkomin
*www.filadelfia.fo*

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikukvøldið 4. okt. kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Mikukvøldið 4. okt. kl. 20.00 í KFUK: Konfirmantaveitsla. Holdið hjá Sverra Steinhólm.
Hóskvøldið 5. okt. kl. 19.30 í KFUK: Hugnakvøld.

**Filadelfia Vágar Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

**Miðvágs missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Hóskvøldið kl. 20.00 bíbiltími við Niels J Nielsen trb. Evni kap 4 í rómverjabrævinum.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Paula Høj, evnið: Ung og kærleiki.
Sunnudagin kl. 17: Familjumøti. (náttverði aftaná, øll taka við).
Vælkomin í Kelduna
*www.keldan.fo*

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl.20.00: Bønarmøti
Hósdagin kl.16,00 - 17,30: Liljur
Sunnudagin kl.10,30: Møti
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin 4. oktober: Bíbiltími kl. 20:00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týsdagin 3. oktober kl. 19.00.
Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Ingvard Petersen greiðir frá trúboðaraarbeiðnum í Venezuela. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane**
*á Brekku 19 Klaksvík*
Mikudagin kl. 20.00 er bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 er ungdómsmøti.
Leygardagin kl.10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl.14.00 er møti við sunnudagsskúla.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunmøti.

**Aglow Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl 20.00 v/ Fríðbjørg Michaelsen. Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.
*Nevndin*

**Betania**
Týsdag verður bønarmøti kl.20.00.
Mikudag verður bønarmøti kl. 20.00.
Hósdag verður bønarmøti kl. 20.00.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00:



SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

# VINN EINA SKÍFERÐ FYRI 2 VAKSIN OG 2 BØRN FRÁ SMYRIL LINE



## Skíðstøðini Voss og Hemsedal

Smyril Line hevur valt út 2 skíðstøð í Noregi – nevniliga Voss og Hemsedal. Eitt við styttri koyritíð og eitt við longri koyritíð. Ynskja ferðandi tað við styttri koyritíð t.v.s. Voss, er møguleiki at koma fram sama fríggjakvøld sum Norröna kemur til Bergens og koyra aftur til Bergens sama sunnumorgun sum Norröna siglur úr Bergen.

Ynskir ein ístaðin Hemsedal vilja vit ráða til, at fyrsta og síðsta náttin eru í Bergen. Koyritíðirnar finnast inni á heimasíðuni hjá Smyril Line www.smyril-line.fo

Í samstarvi við Smyril Line fara vit hvønn dag í 14 dagar at skipa fyri eini spurnarkapping. Nýggjur spurningur verður hvønn dag í Sosialinum. Jú fleiri svar tú sendur inn, jú fleiri møguleikar hevur tú at vinna. Svarlepin skal tó vera kliptur úr blaðnum – avrit verður ikki góðtikið. Seinasta freist at senda inn er mikudagin 18. oktober. 2006.

**Vinningur:** Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili á leiðini Tórshavn-Bergen og aftur í 4 koyggjukamari við vindeygu og wc/bað. Allar máltíðir umborð eru íroknaðar. Hartil 9 nætur í íbúð fyri 4 persónar á Fleischers Apartment í Voss í Noregi. (máltíðir ikki íroknaðar). Virðið á ferðini er uml. kr. 11.995,-.

## Dagsins spurningur

Hvussu long er koyritíðin til Voss?

☐ 1 tíma ☐ 3 tímar
☐ 2 tímar ☐ 4 tímar

Navn: ____________
Bústaður: ____________
Tlf. nr: ____________

Sendi okkum loysnina til:
Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Merk brævbjálvan »Skíðkapping«







VIRÐI: 11.995,-

Sosialurin